## Gerðabók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 18. desembur 2024, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Eyðun Hansen, Laila Haldansen, Anja Haldansen og Ingi Olsen.
**Skrivari:** Rúna Koba

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Pauli T. Petersen, boðað frá, at honum barst frá at møta á fundinum. Tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð og játtaði at møta, men fekk ikki møtt kortini.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 324**
Endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2024 – 2. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 19. novembur 2024 mál um endurskoðaðu fíggjarætlanina fyri 2024.

Nevndin samtykti einmælt at leggja uppskotið til endurskoðað fíggjarætlan fyri 2024 fyri bygdarráðið til 1. viðgerð.

Endurskoðaða fíggjarætlanin fyri 2024 varð einmælt samtykt við 1. viðgerð tann 27. novembur 2024.

**Viðv. 324**
Endurskoðaða fíggjarætlanin fyri 2024 varð einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Mál 325**
Umbygging av Vestmanna Skúla
J.nr.: 8220002-1-2024

Bygginevndin viðgjørdi á fundi tann 12. desembur 2024 mál um innrrætingina av Vestmanna Skúla.

Nevndin mælir til at samtykkja uppskotið um innrættingina av Vestmanna Skúla.

**Viðv. 325**
Bygdarráðið samtykti einmælt tilmælið frá Bygginevndini.

**Mál 326**
Umsókn um leigu av lendi niðanfyri matr. nr. 266m
J.nr.: 8202002-7-2024

Umsókn um keyp av lendi varð noktað av Teknisku Nevnd tann 17. septembur 2024. Nýggj umsókn um keyp av lendi varð somuleiðis noktað tann 22. oktobur 2024, men við tilboði um at leiga lendið.

Umsókn um leigu av lendið varð viðgjørd á fundi í Teknisku Nevnd tann 19. novembur 2024.

Nevndin mælti til at ganga umsóknini um leigu á møti.

Fíggjarnevndin mælti somuleiðis til at ganga umsóknini á møti á fundi tann 11. desembur 2024.

**Viðv. 326**
Bygdarráðið samtykti einmælt tilmælini frá Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndini.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17:50

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen Laila Haldansen

Anja Haldansen Ingi Olsen